BÚNAÐARSTOVAN OG FIKSIMÁLARÁÐIÐ

# Mál og avrik 2013

## Fiskimálaráðið og Búnaðarstovan hava í samskifti sínámillum avtalað niðanfyristandandi áherðsluøki fyri 2013.

1. Stovnurin luttekur virkið saman við aðalráðnum í øllum arbeiði, ið hevur til endamáls at styrkja um vinnuliga og fíggjarliga grundarlagið undir landbúnaðinum. Ítøkiliga verður hugsað um tað arbeiðið, sum ein arbeiðsbólkur, settur av landsstýrismaðurin, setti sjøtul á um árskiftið 2012/2013, millum annað við atliti at gera Føroyar sjálvbjargnar við fóðuri. Arbeiðið er treytað av broytingum í lóg um Búnaðargrunnin og fíggingarmynstur hesum viðvíkjandi.

2. Stovnurin skal menna eina íløgu- og rakstrarætlan fyri útisøvn og tjóðgarð í Koltri. Skipanin um tjóðgarðin (bygnaður við meira) verður ætlandi fest í lóg og kunngerð.

3. Stovnurin skal menna eina ætlan, ið samskipar arbeiðið viðvíkjandi serføroyskum húsdjórum betur. Ætlanin fevnir um keyp av serfrøði, skráseting og kanning av arvafrøðiligum tilfari.

4. Ætlanin undir punkti 2 og 3 er lutvíst treytað av serfígging úr Búnaðargrunninum, sum ætlandi skal fáast til vega við broyting í løgtingslóg.

5. Stovnurin ger eina dagførda lýsing av øllum royndararbeiðinum í 2013 og ger eina ætlan nøkur ár fram í tíðina.

6. Stovnurin er í eini tilgongd, ið hevur til endamál at fara í granskingarsamstarv við uttanhýsis umboð. Áherðsla verður framhaldandi løgd á slíkt samstarv sum skapar grundarlag fyri uttanhýsis fígging av royndum og gransking. Tilgongdin kann fevna um heimligt samstarv ella norðurlendsk samstarv.

7. Umvælingar og dagføringar av bygningum í Kollafirði verða ætlandi gjørdar í 2013 og 2014 við fígging av festikonto í Búnaðargrunninum.

8. Arbeitt verður í felag fram ímóti at leggja fyrisitingarlig kærumál, sum í verandi støðu verða víst til aðalráðið, til annan kærustovn.

Kollafirði, hin 05. februar 2013

___________________________

Bjørn Patursson, stjóri
Búnaðarstovan

___________________________

Rógvi Reinert, aðalstjóri
Fiskimálaráðið